## Tinghúsið á Hjalla søkir eftir tveimum avlaminspensionistum

Er tú avlaminspensionistur, sum hevur hug at koma út millum onnur og fáa ein meiningsfullan gerandisdag so er Tinghúsið á Hjalla kanska nakað fyri teg.

Tinghúsið á Hjalla er ein endurnýstlu handil undir ALV. Endamálið er bæði at geva fólk, við skerdum arbeiðsførleika ein meiningfullan gerandisdag og at innsavna innbúgv frá Brennistøðini á Hjalla, so tað verður endurnýtt.

Umsetningurin er ikki til vanliga løn, men til lønarískoyti, sum í løtuni er 20 kr. um tíman.

Í Tinghúsinum arbeiða í løtuni tríggir avlaminspensionistar og ein vinnuskeiðsnæmingur.

**Vit síggja fyri okkum at tú er**
- Før/ur fyri at arbeiða rættuliga sjálvstøðugt
- hevur góð samstarvsevnir
- er arbeiðssom/ ur og álítandi.

**Okkum tørva:**
- Eitt fólk til handlilin, har uppgávan m.a. verður:
  - At passa kassan
  - At prísa vørur
  - At røkja handilin, so tað er hugnaligt at koma inn
  - Alt tað vanliga , ein endurnýstluhandil førir við sær

**Eitt fólk til goymsluna, har uppgávan m.a. verður:**
- At tøma bingjur
- At røkja goymsluna
- At bera innbúgv inn í handilin
- At gera smáumvælingar av innbúgvi

Talan er um 3 til 4 dagar um vikuna, tímatali kunnu vit tosa um. Sí www.alv.fo

Meira fæst at vita um starvið, við at ringja tlf. 550077, Trøndur Ennistíg, Tinghúsið á Hjalla ella tlf. 350070, spyr eftir Hannu Jacobsen, deildarleiðara.

Umsóknir skulu verða okkum í hendi í seinasta lagi 1. juli 2009 og sendast til alv@alv.fo ella til

Sjálvsognarstovurin ALV
Smiðjugerði 6. kj.
Postboks 301
110 Tórshavn

Brævbjálvin skal merkjast »Tinghúsið á Hjalla«.

## Námsfrøðingar til Dagstovnin í Kvívík

Dagstovnurin í Kvívík søkir eftir 5 námsfrøðingum:

- 4 námsfrøðingum ¾ tíð.
  Størvini eru í vøggustovu, barnagarði og frítíðarskúla.

Tey settu í koma at arbeiða í vøggustovu og barnagarið, arbeiða 3 vikur fulla tíð, tann 4. vikan er frívika. Starvið í frítíðarskúlanum er 6 tímar um dagin.

- 1 námsfrøðingini til 40 tímar í vøggustovu.

Størvini eru tøk frá 1. september 2009, ella eftir nærri avtalu.

Arbeiðstíðirnar eru ímillum kl. 07.00 og 17.30

Dagstovnurin í Kvívík hevur 12 ár á baki og er ein samansettur stovnur, sum heldur til í tveimum ymiskum húsum í Kvívík og einari vøggustovu í Leynum.

**Dentur verður m.a. lagdur á í dagligdegnum:**
- Umsorgan
- Opinleika og rúmsátt
- Sjónlig og týðilig vaksin
- At menna tey skapandi evnini
- Lærandi og mennandi túrar í náttúruni.

Okkara mál við arbeiðinum er, at skapa tryggar og mennandi umstøður fyri børn og vaksin.

Vit ynskja umsøkjarar við námsfrøðiligari útbúgving, royndum, hugi at arbeiða við børnum, hugflogi og løttum sinnalag.

Kvívíkar Kommuna er komin væl áleiðis at byggja nýggjan Dagstovn og kunnu vit tí bjóða tær:

- Ein nýggjan stovn fyrst í komandi árið.
- Møguleikan at byggja ein nýggjan stovn upp.
- Eitt gott arbeiðsumhvørvi bæði inni og úti.
- Møguleikan at seta tín dám á dagligdagin.

**Lønar- og setanartreytir.**
Løn og setanarviðurskifti eru samb. sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya.

Meira kann fáast at vita um størvini við at ringja til leiðaran á telef. 772412, ella varaleiðaran á telef. 221552.

Umsóknir við prógvum, viðmælum og CV skulu vera stovninum í hendi innan 30. juni 2009.

**Kvívíkar Kommuna**
**Víkavegur 4**
**FO-340 Kvívík**

## Fólk til træsmiðjuna hjá ALV í Havn

Vit sóknast eftir einum starvsfólki til træsmiðjuna hjá Alv í Smiðjugerði.

Í framleiðsluvirkinum í Smiðjugerði eru 4 verkstøð umframt Tinghúsið á Hjalla. Dagliga starvast 20 næmingar og avlaminspensionistar, umframt 5 starvsfólk.

Endamálið við deildini er framleiðsla og menning. Alv er ein stovnur í støðugari menning

**Arbeiðsuppgávurnar hjá tær verða í høvuðsheitum**
- at hjálpa tí einstaka til at nýta sínar førleikar
- at finna egnaðar framleiðslur, sum passa til tann einstaka næmingin
- at hava um hendi framleiðsluna, har vit millum annað framleiða ringbind
- at gera træverkstaðin til eitt mennandi arbeiðspláss

**Vit síggja fyri okkum eitt fólk ið hevur**
- viðkomandi handverkara útbúgving
- evnir og hug at læra frá sær
- góð evnir at samstarva, eisini við aðrar fakbólkar og aðrar deildir av ALV.
- dugir/ur at síggja møguleikar heldur enn avmarkingar
- er hugskotsfull/ur, kreativ/ur og jalig/ur
- er rúmlig/ur mótvegis tí frábregandi
- er opin fyri førleikamenning

**Vit kunnu bjóða tær**
- eitt spennandi arbeiði, har góðir møguleikar eru fyri ávirkan
- eitt mennandi umhvørvi við góðum samstarvsfeløgum og goðum samstarvi
- persónligar avbjóðingar, ið geva persónliga menning
- at verða við til at menna Framleiðsluvirkið í Smiðjugerði
- talan kann har umframt verða um at arbeiða á deildum innan ALV. Sí heimasíðuna w.w.w Alv.fo

**Løn og setanartreytir**
Starvið hevur tilvísing til deildarleiðaran og verður at seta 17. aug. 2009.

Lønin verður javnlíknað við pedagogiska økið, smáir búðstovnar.

Meira fæst at vita um starvið, við at ringja á tlf. 350070. Spyr eftir Hannu Jacobsen, deildarleiðara.

Umsóknir skulu verða okkum í hendi í seinasta lagi 1.juli 2009.

Umsókn saman við prógvi, royndarváttan v.m. skal sendast til alv@alv ella til:

Sjálvsognarstovurin ALV
Smiðjugerði 6. kj.
Postboks 301
110 Tórshavn
viðmerk: træsmiðjan

## SUMMARFRÍ

**Vegna summarfrí í juli mánaða, verða bert átrokandi arbeiði gjørd.**

**Palli á Dul**
Løggildugt el-innleggjaravirki
Tel. 218091 - 211789

## MOTORSÚKKLU KOYRIKORT?

**Nýtt teoriskeið til motorsúkklu og R/F skeið byrjar í Eysturoynni skjótt.**

**Tilmelding hjá:**

| | |
|---|---|
| Jari Lykke | 590500 |
| Mikkjal Hansen | 722578 |
| Hugo Kristiansen | 225225 |
| Andrea Isaksen | 211687 |




EYSTUROYAR TEORISKÚLI

Sosialurin
www.sosialurin.fo

## Bókasavnið

er stongt vegna feriu frá 22/6 – 3/8 2009

**Vágs Bókasavn**
Tlf. 37 39 91